## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og vátakavi ella regn. Seinnapartin hækkar hann upp í landnyrðing og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrst lot av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Um kvøldið lækkar hann niður í sunnan, minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men támut veður. Hitin millum 6 og 10 stig.

# Kvinnulig skap í Smiðjuni

**Komandi dagarnar hevur unga listakvinnan Sigga í Hoyvík framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Afturvendandi temaðið í myndunum hjá Siggu er kvinnukroppurin í ymsum aldri og skapi**

LISTAFRAMSÝNING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tú fært hug at draga andan eitt sindur lættari, tá tú sært kvinnumyndirnar hjá listakvinnuni Siggu í Hoyvík. Diddaraku kvinnurnar, sum flestu kvinnur eru heilavaskaðar til at halda seg eiga at líkjast, fjara spakuliga burtur úr huganum, tá litríku kvinnukropparnir hjá Siggu gera krav uppá at vera sæddir, júst sum teir eru - við rundum formum og í so ymiskum skapi, sum kvinnur nú einaferð hava.

Ikki at myndirnar hjá Siggu eru naturalistiskar. Heldur eru tær figurativt koloristiskar, har bleytu men kortini avgjørdu penslastrokini traðka fram, hvørja ferð í einum nýggjum liti, sum fyri at undirstrika ymiskleikan í motivinum.

Kvinnan hevur leingi verið eitt afturvendandi tema í listini hjá Siggu, men í byrjanini vóru kropparnir klænri og meir at kalla fullkomnir. Í sambandi við eina aðra framsýning nevndi Sigga, at hetta helst kom av, at hon var so ung og kanska hevði ilt við at ímynda sær kvinnukroppar í øllum aldri og skapi.

Framsýningin hjá Siggu í Smiðjuni í Lítluvík er opin frá 17. til 23. mars hvønn dag frá 15.00 til 19.00



## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -3 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | -2 |
| Ammassalik | -5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -3 |
| Seyðisfjørður | -3 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 1 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 7 |
| Tromsø | -2 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -4 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | -- |
| Moskva | -1 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 15 |
| Athen | -- |
| Malta | 18 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 14 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 34 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt djúpt lágtrýst, 957 hPa. yvir Atlandshavinum á 49N-40V fer spakuliga í landnyrðing. Brúgvalagið haðani til Skotlands flytur seg spakuliga norðureftir við regni.




**Í dag:**
Lágtrýstið á 52N-36V fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður væntandi yvir Føroyum fríggjadagin við lýggjari veðrið.


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 14/3 kl. 06[00]– 15/3. 06[00]. Hitin í gjár: 1,6°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,9 mm – mált frá 14/3 kl. 06[00]– 15/3 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mars: 10,3 mm

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

16. mars

8. mars Mánin næstur jørðini
10. mars tendring
17. mars Fyra kvarter
19. mars Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16.mars | 11.08 | 23.33 | 10.08 | 22.33 | 10.23 | 22.48 | 00.43 | 13.08 | 01.43 | 14.08 | 09.23 | 21.48 | 08.23 | 20.48 | 11.23 | 23.48 | - | 12.23 | 10.53 | 23.18 | - | 12.08 |
| 17.mars | - | 12.26 | 11.26 | 23.51 | 11.41 | - | 01.33 | 14.26 | 02.33 | 15.26 | 10.41 | 23.06 | 09.41 | 22.06 | - | 12.41 | 00.48 | 13.41 | - | 12.11 | 00.33 | 13.26 |
| 18.mars | 00.51 | 13.30 | - | 12.30 | 00.06 | 12.45 | 02.51 | 15.30 | 03.51 | 16.30 | 11.45 | - | 10.45 | 23.24 | 01.06 | 13.45 | 02.06 | 14.45 | 00.36 | 13.15 | 01.51 | 14.30 |
| 19.mars | 02.09 | 14.34 | 01.09 | 13.34 | 01.24 | 13.49 | 04.09 | 16.34 | 05.09 | 17.34 | 00.24 | 12.49 | 11.49 | - | 02.24 | 14.49 | 03.24 | 15.49 | 01.54 | 14.19 | 03.09 | 15.34 |
| 20.mars | 03.00 | 15.22 | 02.00 | 14.22 | 02.15 | 14.37 | 05.00 | 17.22 | 06.00 | 18.22 | 01.15 | 13.37 | 00.15 | 12.37 | 03.15 | 15.37 | 04.15 | 16.37 | 02.45 | 15.07 | 04.00 | 16.22 |

5 707265 100036 >